

# Básurin úr Suðuroy

**SAMSTARV**

Tíðindaskric

Básur nr 685, Suðuroy – Tvøroyri verður aftur við á Atlantic Fish Fair. Vit tóva við lemmum frá **Rock**, hála okkara veiðu inn við troli frá **Berginum** og landa okkara veiðu til **Landingarmiðstøðina á Tvøroyri**. Í frítíðini fara vit at ferðast við **Strandaferðsluni**, lata okkum í heit klæðir frá **Sirri** og drekka **Sunnbiarvatn**. Alt meðan **Tvøroyrar Havn** og **Kunningarstovan í Suðuroy** leggja ávikavist atløgupláss og ferðir til rættis.

Soleiðis ber til í stuttum at lýsa bás okkara. Sum Suðuroyggin liggur í fjarskotnum parti av Føroyum, liggur básurin beint við endan av framsýningini. Við útgongdina. Fjarskotin, men tó vísandi ymiskleikan í lítla samfelagnum við vinnulívsmonnum, sum royna at seta í gongd og brúka egnar royndir og vitan úr tí globala samfelagnum at vaksa um og røkja virksemi sítt.

Tað var Tvøroyrar Kommuna sum fyri tveimum árum síðanai tók stig til henda básin. Ætlanin var at gera ein bás, ið var serstakur í útsjónd, og samstundis skuldi hava ein samleika. Ikki tí at vinnulívið í Suðuroynni er nakað serstakt, men heldur fyri at vísa á tað neyðuga at marknaðarføra Suðuroynna sum eina eind við framleiðslu og tænastuvinnu bæði alment og privat.

Suðuroy – Tvøroyri fer at royna at lýsa nakrar av teimum nýskapandi vinnunum, ið arbeiða lið um lið við tær siðbundnu. Men eingin stendur í stað. Øll fiskavirkir eru í skrivandi stund í gongd við framleiðslu. Fiskivinnan, og eftirhondini í størri mun alivinnan, vilja altið saman við teimum tænastum sum eru tengdar afturat vera teir stóru framleiðslufaktorarnir, og harvið skapa tey størstu virðini. Men einki lokomotiv uttan vognar at bera førningin í. Og tess virðismiklari førningurin er, tess hugaligari er tað at vera lokomotiv.

Vit fara at ynskja øllum, bæði núverandi og komandi starvsfeløgum, og eisini teimum, ið bert vilja koma framvið at heilsa uppá, at vera hjartaliga vælkomin á okkara bási.




Tín fyritøka kemur í miðdepilin, tá tú velur Eik

www.eik.fo